

Meir enn tvey túsund fólk hava sæð sjónleikin, har børn spæla vaksin og vaksin spæla børn. Seinasta sýningin verður sunnudagin

Sjónleikurin "Óvitar":

Verður bert sýndur hesa vikuna aftrat

Meir enn tvey túsund fólk hava sæð sjónleikin, har børn spæla vaksin og vaksin spæla børn. Seinasta sýningin verður sunnudagin

Bara tríggjar sýningar eru í at velja hjá teimum, sum ikki enn hava sæð sjónleikin "Óvitar" í Sjónleikarhúsinum. Leikurin hevur verið framførdur 16 ferðir, og 2060 fólk hava sæð leikin.

Leikurin kann sigast at vera ein familjuleikur, av tí at hann vendir sær til bæði børn og tilkomin fólk.

Tað óvanliga við hesum leiki er, at børn spæla vaksin og vaksin spæla børn.

Í innihaldi tekur leikurin ymisk fyribrigdi upp, sum eru í fleiri familjum á pallinum, men sum eisini kunnu sammetast við vanligar umstøður hjá familjum í okkara umhvørvi.

Seinastu framførslurnar eru hesa vikuna, frá hósdegi og til sunnudag í Sjónleikarhúsinum, øll kvøldini kl. 19. Atgongumerki kosta 30 krónur fyri øll.

Dagny

Meinigheitshúsið, Tórshavn

Í kvøld, Kristi himmalferðardag, kl. 18.00: Møti v/ D.M.S. ringinum. Innsavnan til D.M.S.

Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli.

Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ John Petersen, trúboðara. Innsavnan til Heimamissión.

KFUM og KFUK Tórshavn

Í kvøld kl. 19–24 í *KFUM:* Opið hús.

Samkoman Sion Vágur

Sunnudag kl. 11.00: Morgunmøti.

Sunnukvøld kl. 18.00: Evangeliskur fundur.

Mánakvøld kl. 20.00: Bønarfundur.

Mikukvøld kl. 20.00: Bønarfundur.

Bønartænastan svarar á tlf. 73941, frá kl. 20.00–22.00.


Ráðgeving fyri børn og ung

á tlf. 10645 mánadag kl. 16 –18.00.


Barnabati

AA-fundir


verða í Havn í dag kl. 17.00 og í kvøld kl. 22.30 í Uppistovu, C. Pløyensgøtu 17.




Hon gekk niðan einar trappur. Tær vóru, eins og alt annað, heilt stórar. Bina kendi seg sum eina meyru í risalandi




Inni á høvuðsgøtuni var øgilig rokan. Fólk og bílar allastaðni. Bina mátti burtur hábani



Hon reddist hesar langu flottu vegirnar



Býurin var stórur. Næstan ræðandi stórur. Háskini sóu út til at rokka til himmals. Bina tordi næstan ikki at ganga her inni



Tíðindaskriv frá fyrireikingarbólkinum til stovnan av felag fyri angistneurosu

Felag fyri angistneurosu

Ein fyrireikingarbólkur, mannaður við 5 fólkum, hevur í eina tíð gjørt fyrireikingar at stovna felag fyri angistneurosu. Komið er nú so langt, at ætlanin er at stovna felagið leygardagin 14. mai. Á stovnandi aðalfundinum, ið verður á Blindastovninum, fer Jegvan Bæk, psykologur, at siga frá viðgerð av sinnisligum trupulleikum.

Vit heittu á MBF at vera okkum til hjálpar, og hava tey stuðlað okkum hesa tíðina. Somuleiðis varð heitt á August Wang, sálarlækna, sum eftir áheitan hevur orðað hetta tíðindaskriv:

Tey seinnu árni er í vesturheiminum vorðin ein størri kunnleiki manna millum um nógvar ymiskar sjúkur og trupulleikar. Í hesum tíðarráki er eisini, at sjúk og avvarðandi alt meira taka seg saman, bæði til at koma saman, men eisini sum áhugabólkar, at gera vart við síni viðurskifti millum manna og hjá politikarunum.


Eisini innan tað sinnisliga økið, eitt nú tá tað snýr seg um sinnissjúkur og rúsdrekka, hava felagsskapir tikið seg upp.

Ofta kann tó verða so, at tað mest vanliga verður gloymt millum tað meira sjáldsama. Soleiðis eisini her, tí lítið er at hoyra um angistsjúkurnar (angistneurosur o.l.), sum tó kanska raka úti við eini 20% av okkum øllum.

Hetta snýr seg um fyri so vítt ógrundaða angist, sum tó fær slíka megi á fólki, at vandi kann vera fyri, at henda angistin, ella angistin fyri at angistin skal koma, fær valdið á einum og stýrir lívinum.

Summi eru plágað av eini umfatandi eingist fyri mest sum øllum, onnur fáa panikkherðindi, aftur onnur hava bert angist fyri ávísum fyribrigdum, sonevndar fobiir.

Eina tíð hava nøkur fólk, stuðlað av MBF, arbeitt við møguleikanum at stovna felag fyri angistneurotikkarar, avvarðandi og áhugað annars. Hetta eru fólk, sum antin sjálvi hava slíkar angisttrupulleikar ella eru avvarðandi. Nú er komið so mikið undir land, at farast kann undir stovnandi fund.



Tit ringja
sosialurin,
tlf. 11820
— vit skriva



TEKJUTRUPULLEIKAR
– Ikki við Hertalan EPDM

- ✔ Reint gummi – einki PVC
- ✔ 100% tott
- ✔ Elastisk frá -50° til +150°
- ✔ 15 ára trygdarváttan

Vegl. prísur álagt v/ trygdarváttan:
Kr. 170–220/m² (u. MVG)
Nærri upplýsingar og óbindandi tilboð:

FINNUR SIMONSEN,
Timburmeistari
Borgartún 4 - 160 Argir
Tlf. 14549 – 87549 – 84549